# Vestergaard sigur ósatt um svart- kjaftabýtið

**- Tað er ikki rætt, at londini rundan um okkum brúka eitt 11 ára skeið sum søguligt grundarlag fyri áseting av svartkjaftabýti, og tað er heldur ikki rætt, at nýggir "aktørar" komu inn í svartkjaftavinnuna í 1998, sigur Arni Hansen, skipari og ein av eigarunum av P/F Vinnuni í Gøtu**

SVARTKJAFTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur boðað frá, hvussu tey tilsamans 67.300 tonsini av svartkjafti í føroyskum sjógvi skulu býtast í 2009, eru tað serliga teir, sum standa aftanfyri P/F Vinnuna í Gøtu, sum eru misnøgdir við fráboðaða býtið hjá landsstýrismanninum.

Hetta er samstundis fyrstu ferð, at svartkjafturin í ávísum tonsatali er býttur millum skip, sum eru í flotanum – og millum skip, sum als ikki eru í føroyska fiskiskipaflotanum longur.

Vit kunnu taka skipini í teirri ráðfylgju og við teimum tonsum, sum Fiskimálaráðið hevur sett upp:

Christian í Grótinum (10.825 tons), Finnur Fríði (5.628), Høgaberg (5.549), Jupiter (4.622), Fagraberg (9.587), Norðborg (4.008), Tróndur í Gøtu (8.525), Næraberg 9.740, Atlantsfarið (873), Betina (1.011), June D (1.096), Saksaberg (1.112) og Carlton (4.724 tons).

Hetta býtið gevur tilsamans 67.300 tons, harav 29.230 tons eru flutt frá 2008.

Av nevndu skipum, sum hava fingið tillutað svartkjaftakvotu, eru í minsta lagi trý ikki í føroyska fiskiskipaflotanum longur.

### Sigur ósatt

Arni Hansen, skipari, sum saman við 10 øðrum eigur felagið P/F Vinnuna í Gøtu, sum aftur eigur Trónd í Gøtu, Finn Fríða og Jupiter, sigur, at landsstýrismaðurin hevur brúkt søguliga veiðigrundarlagið fyri árini 1998-2008.

- Talan er um eitt 11 ára skeið, og hví Jacob Vestergaard júst hevur brúkt hetta áramál, hava vit onga frágreiðing fingið upp á – í øllum førum onga frágreiðing, sum heldur.

Hann vísir á, at landsstýrismaðurin hevur sagt, at hetta 11 ára skeið er brúkt, tí tað gera londini rundan um okkum, tá ræður um býtið av svartkjafti.

- Men hetta er slett ikki rætt. Vit hava kannað eftir, hvussu tey gera í teimum londum, sum hugsandi er, at landsstýrismaðurin sipar til, men har gera tey einki, sum líkist hesum, sigur Arni.

Skiparin og eigarin vísir eisini á, at ein onnur grundgeving hjá landsstýrismanninum fyri hesum áramáli er, at nýggir "aktøtar" komu í hesa vinnu í 1998.

- Men tað er heldur ikki rætt, staðfestir Arni Hansen.

Hann sigur, at felagið í Gøtu hevur vent sær til landsstýrismannin og hevur spurt, hvør grundgevingin so er fyri hesum býti, tá tað, sum landsstýrismaðurin sigur, slett ikki heldur.

- Men haðani hava vit einki svar fingið enn, leggur hann aftrat.

### Órættvíst býti

Uttan at leggja seg út í, hvør hevur skúmað róman, um vit so kunni siga, heldur Arni Hansen, at feløgini í Klaksvík, JFK og Christian í Grótinum, hava fingið nógv meira burtur úr býtinum, enn tey í veruleikanum áttu.

- Eitt nú kom Næraberg inn í flotan í ár 2000 upp á eitt royndarloyvi, men í býtinum, sum landsstýrismaðurin nú hevur gjørt, eigur skipið 9.740 tons av kvotuni. Haraftrat hava skip, sum slett ikki eru í flotanum í dag, eitt nú Betina, June D og Carlton, drigið fittan kvotupart til Klaksvíkar.

Arni vísir á, at teir 11, sum standa aftanfyri P/F Vinnuna í Gøtu, stríðast fyri at vinna síni rættindi, eftir at felagið seinastu árini hevur umsitið eini 50% av pelagisku kvotunum hjá Føroyum.

- Vit stríðast hart, og vit stríðast fyri rættvísi. Vit hava ikki gingið í Havnini og runnið aftaná myndugleikunum, og vit eru ikki politiskt litaðir, sigur hann.

Skiparin í Gøtu heldur tað vera púra burtur við, at slík spekulatión við kvotum nú er komin inn í pelagisku vinnuna.

- Okkara greiða hugsan er, at teir, sum hava skip og vilja vera aktørar í vinnuni, eiga at fáa loyvi at fiska svartkjaftin, sum er at býta – og ikki teir, sum spekulera í kvotum, sigur hann.

### Leggja fótonglar

Arni Hansen dylur ikki fyri, at kvotubýtið kennist, sum at myndugleikarnir rættiliga hava lagt fótonglar fyri teimum 11, sum standa aftanfyri P/F Vinnuna í Gøtu.

- Vit vóru upprunaliga 16, sum áttu Trónd í Gøtu, men við árunum er talið av eigarum minkað niður í 11. Bæði vit, sum eiga í felagnum og teir, sum sigla hjá okkum, kenna avgerðina hjá landsstýrismanninum ógvuliga órættvísa, sigur skiparin í Gøtu. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Jacobi Vestergaard, fiskimálaráðharra, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Finnur Fríði, sum kom í 2004, er flaggskipið hjá P/F Vinnuni, sum 11 parteigarar eiga*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Krevur rættvísa viðferð ella pengarnar aftur

**Tá Adrian Noskweth setti partapening í Atlantic Airways, var tað út frá lyfti landsstýrisins um, at felagið bleiv einskilt, og at tað politiska valdið skuldi ikki leggja seg út í tess viðurskifti. Nú landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur eina aðra áskoðan, heldur Adrian Noskweth seg hava rætt til at krevja sínar pengar aftur, tí landsstýrið hevur brotið sítt lyfti, sigur ráðgevi og umboðsmaður hansara, Parker Donham**

ATLANTIC AIRWAYS
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

**Sosialurin/Rás2:** Áskoðanin hjá Parker Donham minnir ikki sørt um tað, sum vanliga verður sagt um, at ein ítróttarvenjari eigur ikki at broyta eitt lið, sum stendur seg væl. Atlantic Airways klárar seg sera væl samanborið við altjóða flogferðslu yvirhøvur, og tí er tað burturvið at gera broytingar í leiðslu felagsins, sigur hann.

Teir seinastu dagarnar hevur Parker Donham verið á fleiri fundum her í Føroyum í sambandi við aðalfundin hjá Atlantic Airways í morgin. Her er her um umboðsmaður fyri tann størsta útlendska íleggjaran í føroyska flogfelagnum, Adrian Noskweth, og teir eru als ikki nøgdir við ætlanina hjá landsstýrismanninum í vinnumálum at broyta nevndina, soleiðis at tað almenna fær ræðið á felagnum.

Parker Donham sigur, at tað týdningarmesta er at fáa staðfest, um Atlantic Airways skal vera eitt alment felag ella eitt privat felag. Tað eru fyrimunir við báðum, men tað er ikki nakað, sum teir privatu parta-eigararnir skulu gera av, tí ta avgerðina eiga føroyingar og tað føroyska landsstýrið, sigur Parker hann við Vinnurásina hjá Rás2. Hann vísir á, at fyri einum ári síðani var eingin ivi um, at føroyska flogfelagið skuldi einskiljast.

– Tá var full semja í Løgtinginum um at einskilja felagið, og at tað almenna skuldi ikki leggja seg útí, hvussu felagið bleiv stýrt. Út frá hesum gjørdu vit av at seta pengar í felagið, sum vit kendu frammanundan sum eitt sera væl rikið felag. Men nú er tað líkt til, at Johan Dahl hevur eina aðra áskoðan. Eg skal ikki leggja meg útí, hvat hann eigur at gera, men fyri okkum hevur tað týdning, at tey, sum settu pengar í felagið út frá teirri fyritreyt, at felagið bleiv einskilt, fáa eina rættvísa viðferð. So fáa vit ikki eina loysn, sum vit kunnu góðtaka, vilja vit fegnir hava okkara pengar aftur ella okkurt við samsvarandi virði, sigur Parker Donham.

### Reglur ikki hildnar

Ráðgevin setir spurnartekin við mannagongdina hjá landsstýrismanninum og vinnumálaráðnum í málinum við Atlantic Airways. Parker Donham sigur, at tá eitt felag verður skrásett á virðisbrævamarknaðinum, eru ávísar reglur, sum skulu haldast. Ein av hesum reglunum sigur, at ætlaðar broytingar í leiðsluviðurskiftuunum skulu fráboðast formliga, og harafturat skal marknaðurin eisini hava boð um, hvør skal veljast í nevndina. Hetta er ikki gjørt, sigur Parker Donham.

Hann skilir væl, at summi seta spurnartekin við, um Atlantic Airways er ein ov týdningarmikil partur av føroyska samferðslukervinum, til at tað kann einskiljast. Sjálvur heldur hann, at tað er ein fyrimunur at einskilja felagið og vísir á royndir í eitt nú Kanada, har hann býr.

– Tað avgerandi fyri okkum er, at lyftið, sum mvit fingu frá landsstýrinum, og sum vit bygdu okkara íløgu á, verður hildið. Okkara krav er bara, at vit fáa eina rættvísa viðferð. Fáa vit ikki tað, mugu vit fáa okkara pengar ella tilsvarandi virði aftur, sigur Parker Donham við Vinnurásina hjá Rás2.



*Parker Donham vónar, at tað fer at bera til at loysa trætuna á sømiligan hátt, men hann leggur afturat, at fáa teir ikki eitt úrslit, sum teir kunnu góðtaka, kann málið enda í rættinum*